gult cyan magenta svart



# Sonn jólagleði – Gleðiboðini til hirðarnar

Og tað vóru hirðar har í sama bygdarlaginum, sum lógu úti á markini um náttina og goymdu at seyðafylgjum sínum. Og sí eingil Harrans stóð hjá teimum, og dýrd Harrans ljómaði rundan um teir, og teir vóru ógvuliga óttafullir. Og eingilin segði við teir: »Óttist ikki; tí sí, eg kunngeri tykkum eini stóð gleðiboð, sum skulu vera fyri alt fólkið. Tí at tykkum er í dag ein frelsari føddur, sum er Harrin Kristus í Dávids staði!« Luk. 2, 8-11.

Jólini standa fyri durunum, hendan vælsignaða hátíðin, sum ber gleði og jólahugna inn í heimini; fólk stákast, vaska, baka, prýða stovur, køk, kømur og annað, sum kann skapa jólahugna, serliga har sum børn eru, hetta kann alt samalt vera gott og gagnligt til gleði fyri børn og vaksin; men tað sonnu jólagleðina kann hetta ongantíð skapa, hetta er bert nakað sum er uttaná, sjálvt um muður lær, kann hjarta gott gráta, tí at tað er bert eitt, sum er neyðugt til tess at skapa sanna jólagleði í hjørtum og heimum okkara, tað er at vit opna hjørtu og heim okkara fyri Jesusi, soleiðis at hann verður jólagestur okkara, tá fáa vit veruliga jólagleði, sum varir við alt lív okkara.

Um hetta skal eydnast fyri okkum, so mega vit leggja leiðina um Golgata, tí tað var jú har, at Jesus ofraði seg í okkara rúm og stað, tá ið hann rópti, tað er fullgjørt! Tá hendi nakað so undursamt, at hann sum var føddur í fjósinum í Betlehem, lat seg negla til krossarplankan á heygnum Golgata, har øll okkara synd var sónað, øll okkara skuld goldin, skuldarbrævið liggur við krossins fót og bíðar eftir okkum; um vit kenna syndabyrðuna tyngja, og boyggja okkum niður við krossins fót hjá Jesusi, og har biðja um fyrigeving fyri allar syndir okkara, tá føðist ein gleði og tøkk í hjørtum okkara, til hansara sum doyði á krossinum reis upp aftur páskamorgun; hendir hetta í lívi okkara, fáa vit sanna jólagleði, sannan jólafrið í hjørtum og heimum okkara. »Og hetta skulu tit hava til merkis: Tit skulu finna eitt barn reivað og liggjandi í eini krubbu«. Og í somu stund var hjá einglinum ein fjøld av himmalskum herskarum, sum lovaðu Guði og søgdu: »Heiður veri Guði í hægsta himli, og friður á jørð, og í menniskjum góður tokki!« Luk. 2, 12-14.

Hesin gleðiboðskapur, sum ljóðaði hina fyrstu jólanáttina uttanfyri Betlehem náddi eisini okkara smáu oyggjar her úti í atlantshavið fjart frá fløtunum har hirðarnir hoyrdu hesi lívsælu tíðindini; eisini vit fingu hesi tíðindini og sostatt kunnu vit eisini leggja uppí tann himmalska lovsongin, sum einglarnir sungu um frelsarin sum var føddur í fátæka fjósinum í Betlehem. Um vit sum áður sagt opna hjørtu og heim okkara fyri hesum frelsara, so kunnu vit við gleði halda jól, hendan gleðin um jólaboðskapin føðist í hjørtum okkara við trúgv á Jesu Kristi náði og ongum øðrum.

Tíðanverri eru tað mong sum royna at skapa gleði og jólahugna við rúsdrekka og øðrum rúsandi evnum (eiturevni); nei, rúsdrekka skapar ongantíð nakran hugna, tvørtur ímóti skapar tað trupulleikar innanhýsis og uttandura, familjulívið verður skert; mamman kanska roynir at gera alt so hátíðarligt og hugnaligt fyri familjuna sum yvirhøvur gjørligt, so verður alt oyðilagt av brennivíni, fløskan verður miðdepulin í øllum jólahaldinum, tá er mong ein mamma og mangt eitt barn vónsvikið; nei góðu tit, latið jólini verða rúsfrí, soleiðis at familjan kann hugna sær saman, og sum áður sagt fleiri ferðir, opnið hjørtu og heim tykkara fyri jólaboðskapinum soleiðis at tit sameind kunnu fagnað jólunum, og harvið fagnað honum sum jólini bera boð um.

Síðani vil eg enda við einum jólasálmi, sum eg havi yrkt til jólini 2000. Gleðilig jól og gott nýggjár í Jesu navnið.

### Jólasálmur

Lag: Fagur himin er at sjá. Bf. 20. Dk. 35,36

Stjørna bjørt á himni hátt,  
lýsti fornu jólanátt;  
einglasongur hoyrdist ljóða,  
ber boð frá Gudi góða!  
:,: Frelsarin nú føddur er.:,:

Hirðar sótu fylgjum hjá,  
einglasong teir lýddu á;  
alt so fagurt var at skoða,  
himmalin við stjørnuloga.  
:,: Barnið føtt í fjósið var.:,:

Gleðiboð so sæl og góð,  
menniskju so glað og fróð;  
jólagleði, jólafriður,  
er frá Gudi komin niður.  
:,: Jesus, frelsa heimsins er.:,:

Barnaeygu glógva bjart,  
nú er ljóst, har fyrr var svart;  
lovsongur á mannatungum,  
ljóðar enn frá gomlum, ungum.  
:,: Eins og fyrstu jólanátt.:,:

Jól vit halda enn í dag,  
syngja øll av hjarta glað;  
tí at barnið, føtt í fjósið,  
er tað sannað bjarta ljósið.  
:,: Lýsir heim í páradís.:,:

Jesus kom tú til oss inn,  
fyll várt hjarta, sál og sinn;  
við tí gleði, hirðar fingu,  
tá teir inn í fjósið gingu.  
:,: Sóu Jesusbarnið har.:,:

Kjartan Stakksund

## Skurðgudar



Eitt land  
yvirfylt av skurðgudum  
í alskyns  
skapum og litum  
ymiskir  
í sinn og skinn

sat har í díkinum  
var eitt við óhumskuna  
bað meg  
geva sær  
ein lítlan vatndropa

gekk framvið  
sá, hoyrdi, tevjaði  
meg eg hevði ikki stundir  
skuldi nakað annað

altíð á ferð  
til nakað annað

tó onki dróg meg  
til onki  
hevði skund

eins og ein orkan  
sópar alt undan sær  
oyðir alt í øllum

telgdi skurðgudar  
yndisligar, fagrar

gjørdi teir livandi  
í deyðans dali  
í deyðans líki

hesir píningarnir  
fylla allan vesturheimin

men við eitt  
var gáloysin  
dýrabæran skurðgud  
eg misti  
fór rekandi  
oman eftir ánni  
út av fossinum  
hvarv í dýpið

ein av mínum  
materalistiska  
hugsunnarhátti  
fór fyri skeyti

sorgin nívdi fast  
tútbrølandi  
heim til onki

byrjaði aftur  
at telgja skurðgudar  
enn fagrari enn áður  
fleiri og fleiri  
í dagar, vikur, ár  
uttan íhald

bleiv so niðurboygdur  
eins og ein gjørð  
fór á rull  
steðgaði ikki aftur

út av fossinum  
sama veg  
sum skurðgudurin  
innar í tómleikan

skurðgudar í øllum líki  
hábærsligir og hástórir  
gingu aftur

allastaðnar  
úr einum stað í annað  
og aftur

eins og teir óminnisdrykk  
høvdu drukkið

eins og særdir hvalir  
aftur á blóðið

eins og støðuvatn-  
deyðavatn  
súrevnistrot  
var ikki drekkandi  
smakkaði illa  
rotinskapur  
onki lív

stórar mongdir  
og stór hol  
styrkin í skurðgudunum

steindeyðir  
sóu eins út  
bæði í sinn og skinn

sótu altíð  
í fremstu røð  
á ovastu rók

fekk tað destruktiva  
hugskot

blaka teir á bláman  
og gloyma

byrja av nýggjum

eg dugi jú annað  
enn telgja skurðgudar

frameftir skoða  
av rennandi løki  
drekka

rennur í stríðum streymum  
leskiligt drekkivatn  
balsam fyri sál og likam

niður at húka  
og síðan drekka

stóð har aftur  
bað meg drekka

eg játtaði  
sá, hoyrdi, tevjaði  
tástaðni gav eg  
tí tysta  
eitt glas  
av frískum, rennandi  
kelduvatni

skurðgudarnir  
vóru burturbeindir  
vorðnir til beinagrindir

ein vælsigna sæla  
tess ásjón geislaði  
um allan heimin

tó eftir sótu  
gamalmennini  
og telgdu sær skurðgudar  
jú fleiri og fleiri  
sum árini gingu

krøkja seg fastan  
í hesar skurðgudar  
eins og maður í havsneyð  
einasta bjargingarbelti

úr eygum teirra  
lýsti tómleikin

tá humanisman  
vorðin til materialismu  
má eg steðga á  
og venda við aftur  
byrja av nýggjum  
á røttu ljósins leið  
materialistiski gudurin  
bert eitt í hyggju hevur  
hans einasta mál  
sprænir eitur  
oyðir og leggur alt í sor

men illanstíð  
eg reisist á føtur  
skoði sólarroðan í eystri  
av sonnum  
frælsur tá eg verði

eg stóð eftir einsamallur  
burtur úr ongum  
bleiv nakað  
lívið vendi aftur  
eg bleiv heilur  
óhumskan hvarv  
reinleikin fann veg

av sonnum  
skurðgudar í mannalíki  
ein drepandi sótt

fann meg sjálvan  
fekk sálarfrið  
hvønn morgun  
fyllist av kærleika

Jú sanniliga er  
lívið dásamligt, fagurt,  
spennandi  
uttan skurðgudar.

*Des. 2000*

*Sólmundur Joensen*








**FILMSTEIGURIN**

# Meet the Parents

Hvussu er tað, vit siga í brúdleypum? Hugsa ikki um tað sum at fáa sær ein maka, hugsa um tað sum at gerast ein góður verpápi!

Greg hevur funnið sín lívskærleika í Pam Byrnes. Beint áðrenn hann skal fríggja til hana, fatar hann, at hon er ein rættiliga babbasagenta, og at tað verður lættari at handtaka pápan um hond hennara. Og so hóskar tað so væl, at tey eru boðin á vitjan – tey skula í brúdleyp hjá lítlsystir.

Men óheppið er tað kortini, at Greg missir kuffertið við klæðum og trúlovilsisringinum. Tað ger tað heldur ikki lættari, at Pam helost við fjala, at tey búgva saman, at greg verður noyddur til at goyma sigarettirnar undir vitjani, at hann »bara« er sjúkrahjálpari, meðan brúdgommurin hjá lítlusystur er lækni – við góðum úrslitum., at pápi Pam elskar kettur, meðan Greg er hundamenniskja, at Greg kemur at gera ymiskt »óheppi«, so sum at fáa septiktangan at flóta yvir, kemur at sleppa kettuni út, so hon stingur av, og kemur at seta eld í brúðarpavilliongina.

Sum um tað ikki var nóg mikið við øllum hesum ólukkunum, so letst komandi verfaðirin als at dáma komandi versonin.

Tá vit so hava í huga, at tað er Robert DeNiro, sum hevur høvuðsleiklutin sum pápin, so er skilligt, at tann neyðars Greg, ið Ben Stiller leikar, verður eitt sindur fjálturstungin. Meet the Parents vísir øllum ungum teirra ringastu marru: At møta verforeldrunum – kortini rættiliga humoristiskt…

# The 6'th Day

Ímynda tær eina verð við ongum sjúkum, sum ikki kunnu lekjast… ein heim, har djórasløg ikki longur eru hótt, har hungursneyðikki longur er til, har handlarnir eru á tremur við gen-viðgjørdum mati, og har medisinsku royndarstovurnar hava stórar goymslur av gøgnum, sum eru klár at flyta yvir í kroppar, sum hava brúk fyri teimum.

Ein heimur so framkomin, at kelidjór kunnu verða klónað og enntá framleidd, so tey hóska til inrættingina í húsunum hjá tær. Ein heimur, har virtuella daman hjá tær er framleidd júst eftir tínum ynskjum… ein undrun-arsamur heimur, har tað, sum menniskjað hevur arbeitt fram ímóti síðani tíðarinnar morgun umsíðir er komið undir land – ódeyðiligheit.

Men í hesum heimi í nærmastu framtíð, har vísindin hevur vent fiktion til fakta, hevur tøknin eina myrka síðu. Sjálvt um tað er forboði sambært sættadagslógini, brúkar ein kensluleysur maður sína framkomnu gentøkni til at klóna menniskju til egnan vinning…

# Tigerdyrets familiefest

Vit eru við Tikaradjórinum Hundrametraskógini, har hann saman við øllum vinum sínum ger um seg.

Ikki øll eru fegin um káta lyndi hjá tikaranum, og meðan hann fegin ger sítt lupti luper super duper lop, illneitast hini alt meira.

Peter Plys fær ikki savnað nóg mikið av hunangi til veturin, Grislingurin fær ikki nóg mikið av brenni og Asnin hevur brádliga einki hús. Alt orsakað av Tikaradjórinum.

Lítla kengurubarnið roynir tó at troysta Tikaran, og fyri at hjálpa verður lurtað eftir, hvat hin klóka Uglan hevur at siga.

Hesin tosar um at finna røtur sínar og ættartræið, og fyri at finna familju sína, fer tikarin nú úr at finna hetta træ. Træ er tó sjálvandi einki at finna, tí Tikarin hevur misskilt alt hetta, men tað kemur tó kortini ein stuttlig søga burturúr.


**HAVNAR BIO**

☆ Tlf. 311956 ☆




**Undanfrumsýning**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 22.12. | kl. $23^{00}$ | Leygardagin | 23.12. | kl. $23^{00}$ |

**Frumsýning**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 2. jóladag | 26.12. | kl. $19^{30}$ | 2. jóladag | 26.12. | kl. $21^{45}$ |
| Mikudagin | 27.12. | kl. $19^{30}$ | Mikudagin | 27.12. | kl. $21^{15}$ |




**Frumsýning**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 2. jóladag | 26.12. | kl. $21^{00}$ | 2. jóladag | 26.12. | kl. $24^{00}$ |
| Mikudagin | 27.12. | kl. $21^{00}$ | Mikudagin | 27.12. | kl. $24^{00}$ |

**www.in.fo/havnarbio**




**Frumsýning**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 2. jóladag | 26.12. | kl. $16^{00}$ | 2. jóladag | 26.12. | kl. $17^{45}$ |
| Mikudagin | 27.12. | kl. $16^{00}$ | Mikudagin | 27.12. | kl. $17^{45}$ |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 22.12. | kl. $20^{15}$ | Fríggjadagin | 22.12. | kl. $22^{30}$ |
| Leygardagin | 23.12. | kl. $20^{15}$ | Leygardagin | 23.12. | kl. $22^{30}$ |
| 2. jóladag | 26.12. | kl. $23^{30}$ | Mikudagin | 27.12. | kl. $23^{30}$ |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 22.12. | kl. $21^{00}$ | Leygardagin | 23.12. | kl. $21^{00}$ |
| 2. jóladag | 26.12. | kl. $19^{00}$ | Mikudagin | 27.12. | kl. $19^{00}$ |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 22.12. | kl. $18^{30}$ | Leygardagin | 23.12. | kl. $18^{30}$ |
| 2. jóladag | 26.12. | kl. $16^{30}$ | Mikudagin | 27.12. | kl. $16^{30}$ |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 22.12. | kl. $18^{00}$ | Leygardagin | 23.12. | kl. $18^{00}$ |

*Seinasta sýning*

HAVNAR BIO *ynskir øllum viðskiftafólkum sínum eini gleðilig jól*

